## Taka væl ímóti ferðafólki

Í grønlendska býnum Nanortalik hava meiri enn 60 felagsskapir av ymsum slagi tikið seg saman fyri at samskipa tiltøkini, sum eru neyðug og røtt, tá tey stóru ferðamannaskipini vitja býin. Fyrireikararnir hava nú sett saman eitt tilboð, sum hevur fingið heitið "Opin býur", og í tí fáa ferðafólkini kórsang, fólkadans, kaffimik og framsýning við kajak og konubáti. Herumframt skipar býarsavnið fyri einari framsýning, har fremmandafólkini kunnu síggja, hvussu grønlendingar húsaðust í sínum summarbústøðum fyrr, og hvussu teir hagreiddu kóp og annan mat.



# Frástøðan eingin vansi




*Bødvar Poulsen hevur alla tíðina havt nóg mikið at gera í sínum snikkaravirki í Dali. Har er gott at vera, men hann ræðist tann dagin, tá Dalsvegurin rapar. – Tað er ikki ein spurningur um tað hendir, men bara nær tað hendir, sigur hann*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**– Flestu av mínum kappingarneytum eru í Danmark, so frástøðan frá meginøkinum verður ríkiliga vigað upp við friðinum, eg havi í arbeiðinum her suðuri í Dali, sigur Bødvar Poulsen, sum fyri níggju árum síðani valdi at flyta sítt snikkaravirki úr Havn suður í Sandoynna**

HANDVERK

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Søgan um, hví Bødvar Poulsen valdi at skifta »pulserandi býarlívið« í Havn út við friðarliga og »fjarskotna« umhvørvið í Dali, er søgd fleiri ferðir, men fyri tað kunnu vit endurtaka hana einaferð enn.

– Tað byrjaði alt í kreppuárunum í 1995, tá eg endaði í kjallaranum hjá mær sjálvum úti á Norðasta Horni saman við Torfinn Húsgarð, og har arbeiddu vit so í nøkur ár, sigur Bødvar Poulsen.

Hann hevur konu úr Dali, og vanliga ferðaðust tey nógv suður hagar um vikuskiftini, minst annaðhvørt.

– Einaferð eg var í brúðarhúsi her suðuri lat eg eitt orð falla um, at tað helst ikki fór at ganga long tíð, áðrenn vit fluttu suður, og so fangaði borðið. Hetta var um heystið í 1999, og longu í januar 2000 fluttu vit suður, eg bygdi hetta verkstaðið, og vit hava so verið her síðani. Her er veldugt at vera, sigur Bødvar Poulsen.

Hann heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki at virkið liggur suðuri í Dali.

– Nei, trupulleikin liggur í ferjuni. Skal eg til Havnar eitt ørindi, má eg fara minst ein tíma framman undan, tí eg má altíð standa ein hálvan tíma í bíðirøð í Skopun, men annars er eingin trupulleiki. Eg fái betri frið at arbeiða her, so tann fjarstøðan bilar ikki. Eg havi mínar størstu kappingarneytar í Danmark, tí tey fáu verkstøðini, sum gera trappur í Føroyum, klára væl at dekka marknaðin. So kappingin kemur úr Danmark, sigur Bødvar Poulsen.

Og tað er fyrst og fremst trappur, sum Bødvar Poulsen fæst við suðuri í Dali.